FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Hoyringarsvar frá Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt

Viðmerking til uppskotið um at strika dagstovnráðið, og heldur seta á stovn eitt samstarvsráð mannað av pørtum frá landi og kommunum

Fróðskaparsetur Føroya
University of the Faroe Islands

J.C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel. +298 352 500
Fax +298 352 501

setur@setur.fo

www.setur.fo

- **Í núverandi dagstovnalóg stendur soleiðis § 2 a. Stk. 3. Í Dagstovnaráðnum eru nýggju umboð, sum verða vald soleiðis:**

1) Kommunufelagið velur trý umboð, av hesum minst eitt við námsfrøðiligari útbúgving og royndum innan dagstovnaøkið, og eitt foreldraumboð
2) Mentamálaráðið velur eitt umboð við námsfrøðiligari útbúgving og royndum innan dagstovnaøkið,
3) Námsvísindadeildin á Fróðskaparsetri Føroya velur tvey umboð við námsfrøðiligari útbúgving og royndum innan dagstovnaøkið,
4) Føroya Pedagogfelag velur tvey umboð við námsfrøðiligari útbúgving og royndum innan dagstovnaøkið, og
5) Javnstøðunevndin velur eitt umboð.

- **Í nýggja uppskotinum stendur, at dagstovnaráðið verður strikað og ístaðin er uppskot um at seta á stovn eina samstarvsnevnd:**

  § 3 c. Landsstýrisfólkið og kommunurnar skipa eina samstarvsnevnd fyri dagstovnaøkið við tí endamáli at fremja felags fakliga menning, samskipan og ráðgeving á lands- og kommunalum stigi. **Stk. 2.** Nevndin verður mannað við javnbjóðis tali av umboðum frá landinum og kommununum. **Stk. 4.** Landsstýrisfólkið ásetur við kunngerð nærri reglur um skipan, manning og virksemi nevndarinnar."

<u>Viðmerkingar til nýggja uppskotið</u>:

Tað er sera óheppið, at Námsvísindadeildin ikki er nevnd í lógaruppskotinum, saman við øðrum viðkomandi og týdningamiklum pørtum í samfelagnum, sum eru við til at tryggja m.a. gjøgnumskygni, fakligheit og rættvísi. Í uppskotinum verður nevnt at dagstovnaráðið ikki hevur virka nóg væl og verður tí skotið upp at gera samstarvsnevnd har landstýrismaður í kunngerð ásetur hvør er við í tí nýggju nevndini. Hetta meta vit ikki er rætt, tí í eini kunngerð kann landsstýrismaðurin møguliga víkja frá. Vit vilja heldur mæla til, at dagstovnaráðið heldur áfram, men verður betur skipað. Um einki dagstovnaráð verður, men einans ein samstarvsnevnd, so er týdningarmikið,

at tað verður ásett við lóg, at viðkomandi partar, harímillum Námsvísindadeildin, skulu manna ráðið.

Harafturat hava vit viðmerkingar til § 8 og § 8 stk. 4

§ 8 Til tess at røkja tað dagliga arbeiðið, setir kommunan ein leiðara fyri dagstovnin ella dagrøktarskipanina við námsfrøðiligari útbúgving.

Viðmerking til § 8: Hvat er námsfrøðilig útbúgving? Kundi verið greiðari hvat fyri útbúgving og hvussu langa útbúgving leiðarin skal hava?

§ 8 *stk 4.* Starvsfólkabýtið á dagstovnum skal í minsta lagi verða 2/3 til námsfrøðingatímar og í mesta lagi 1/3 til hjálparfólkatímar

Viðmerkingar til § 8 *stk 4* : Hvat er námsfrøðingatímar?
Námsvísindadeildin hevur tað seinasta árið verið er í gongd við at menna eina nýggja útbúgving, *"Diplom í námsfrøði",* sum vantandi fer av bakkastokki um stutta tíð. Ein útbúgving sum telur 120 ECTS á Bachelor stigi. Tvs, at Námsvísindadeildin fer at bjóða tvær útbúgvingar út, sum koma at vera ymiskar í longd og læruúrtøkum.

- Bachelor sum námsfrøðingur telur 240 ECTS
- Diplom í námsfrøði telur 120 ECTS. (Man kann siga, at tey, sum fara at taka Diplom í námsfrøði, fara at hava eina ½ námsfrøðingaútbúgving).

Hvar í "býtislykilinum" koma tey, sum hava tikið Diplom í námsfrøði, at innganga?
Okkara meting er, at hesi fólkini ikki kunnu roknast sum námsfrøðingar og heldur ikki hjálparfólk.
Tí vilja vit mæla til, at ein nýggjur "býtislykil" verður gjørdur, har víst verður á, hvussu stórur partur av starvsfólkunum skulu vera námsfrøðingar, kunnu hava "Diplom í námsfrøði" og kunnu vera hjálparfólk.

Tey, ið hava gjørt viðmerkingar til lógaruppskotið eru umboð fyri námsfrøðingaútbúgvingina á Námsvísindadeildini

- Marius Joensen, útbúgvingarleiðari
- Sonja Olsen, Ph.d.- vísindastarvsfólk

Verandi lóg :
https://www.logir.fo/Logtingslog/67-fra-10-05-2000-um-dagstovnar-og-dagrokt-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-38

Uppskotið um lógarbroyting:
https://landsstyri.cdn.fo/savn/4prbbp4h/dagfoera-dagstovnalogina-281125.pdf?s=_q1aL9DX6HgfzsQyuWTYjL40JZc